## Ikki bruttoskatt

Kommunurnar í Grønlandi vilja ikki vita av einum uppskoti hjá landsstýrinum um at gera eina bruttoskattaskipan fyri útlendingar, sum koma til Grønlands at arbeiða. Kommunurnar siga, at ein tílík skipan fer at skerja teirra inntøkugrundarlag munandi, og tær vilja tí hava landsstýrið at taka uppskotið aftur. Formaðurin í kommunufelagnum, Emil Sandgreen (myndin), sigur við KNR, at kommunurnar skulu brúka nógvar pengar til eitt nú barnagarðar, skúlar og vegir, og at júst skatturin frá teirri útlendsku arbeiðsmegini kann vera við til at fíggja hetta.



## Elsti danin deyður

Tann elsti borgarin í danska kongaríkinum, Thyra Kongsø, er deyð, 109 ára gomul. Frederiksborg Amts Avis skrivar, at Thyra Kongsø var fødd á oynni Fur tann 9. januar í 1901. Sum ung flutti hon til Mors, har hon fekk útbúgving sum skræddari. Sum 20 ára gomul kom Thyra til Keypmannahavnar. Har bleiv hon gift og fekk ein son. Maðurin doyði fyri 36 árum síðani. Frederiksborg Amts Avis skrivar, at Thyra Kongsø vaks upp í einum missjónskum heimi, og at trúgvin hevði stóran týdning fyri hana og var viðvirkandi til, at hon fekk eitt so langt lív.

# Bjargingarlið koma skjótari fram

**Nú hevur løgreglan fingið nýggja telefonskipan at senda boð kring landið. Gamla skipanin er 13 ára gomul og var mett at vera ótíðarhóskandi. – Bjargingarfólk hava nógv størri møguleika at koma skjótari fram, sigur Jón Klein Olsen, varapolitiinspektørur**

TELEFONSKIPANE
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*




*Jón Klein Olsen, varapolitiinspektørur, fegnast at boð kunnu koma skjótari út til telefonirnar hjá bjargingarfólkunum kring landið*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

»Hetta er ein roynd frá alarmsentralinum til sløkkiliðið á Skálafjørðinum í samband við, at útkallingarskipanin verður tikin í nýtslu í dag. Trýst 1, um tú hevði kunnað møtt. Trýst 2, um tú ikki hevði kunnað møtt. Fyri endurtøku av boðunum, trýst 3.«

Soleiðis vóru boðini til sløkkiliðið á Skálafjørðinum klokkan gott 10 í morgun, og ein minutt seinni høvdu 14 sløkkiliðsfólk boðað frá, at tey kundu møta at sløkkja eld, og ein hevði boðað frá, at hann ikki kundi møta. Fimm høvdu ikki svarað boðunum.

Hetta er støðan í dag. Alarmsentralurin veit beinanvegin, hvussu nógv sløkkiliðsfólk kunnu møta til eina støðu, og kann beinanvegin tilkalla fleiri, um ikki nóg nógv svara, at tey vilja møta.

Men seinastu 13 árini hevur løgreglan brúkt somu telefonskipan at senda boð um vanlukkur til ymisku bjargingarliðini kring landið. Í 1997 var skipanin nýskapandi, men í dag er hon ótíðarhóskandi og ov óstøðug.

Tað var millum annað soleiðis, at liðini bert skuldu vátta fyri, at tey høvdu móttikið boðini, men ongin visti, hvussu nógv kundu møta, fyrr enn fólk vóru á staðnum. Harumframt kundi gamla skipanin bert senda til átta fólk, og máttu bíða til øll boðini vóru farin, áðrenn tað bar til at senda til fleiri.

Hetta er nú broytt, tí nýggja skipanin, sum er keypt fyri einar 100.000 krónur, kann senda til ein nærum óavmarkað tal av fólki, og kann senda fleiri ymisk boð í senn.

Men hvat merkir tað fyri okkum, sum koma í neyð?

– Bjargingarfólk hava nógv størri møguleika at koma skjótari fram, sigur Jón Klein Olsen, varapolitiinspektørur

### Gjøgnum internetið

Tað er internetið, sum verður nýtt til nýggju skipanina, og signalið verður sent til ein servara í Noregi, sum sendir boðini víðari til bjargingarliðini í Føroyum.

Men fer internetið, so koma boðini framvegis fram.

– Eg hevði mín iva, tá eg las um skipanina, tí vit vita, at internetið kann svíkja, men her eru bæði reim og seðlar nýtt. Skuldi tað verið galið, so kann operatiørurin á alarmsentralinum ringja til eitt ávíst nummar í Noregi, og tosaði boðini inn har, og so koma boðini út á sama hátt, sigur Jón Klein Olsen.

Og er støðan soleiðis, at tað heldur ikki virkar, so hevur alarmsentralurin møguleika at ringja upp á vanligan hátt.

### Riggar væl

Sambært løgregluni er hendan skipanin nú kannað so mikið, at tað kann staðfestast, at hon riggar væl.

– Vit hava royndt at senda eina test til brandfólkini í Miðvági og Sandavági, uttan at teir vistu, hvussu skipanin riggaði. Men longu eftir einum minutti høvdu 12 kvitterað uppá, at teir kundu koma og fýra at teir ikki kundu koma, so tað vísir bara, at fartelefonin riggar væl til hetta, og at skipanin er einfald at brúka, greiðir Jón Klein Olsen frá.

Hann staðfestir somuleiðis, at bjargingin kann koma skjótari fram.

– Borgarin kemur ikki at merkja meira enn tað, at tryggleikin er størri. At mann veit tað, at tá boð fara til alarmsentralin, so er nógv effektivari tøkni at boðini koma út. Og tá vit tosa um eld til dømis, so hava minuttir og sekund nógv at siga, staðfestir varapolitiinspektørurin.



*Hallgrím Hansen, vaktleiðari, sendi í morgun boð til sløkkiliðið á Skálafjørðinum. Heilt skjótt komu boð aftur, at 14 vóru til reiðar at sløkkja eld*
*Mynd: Jens Kristian Vang*